# Ársaðalfundur í Suðuroyar Sparikassa P/F

Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í Suðuroyar Sparikassa P/F tórsdagin 28. apríl 2011 kl. 19.00 á nýggju høvuðsskrivstovuni hjá Suðuroyar Sparikassa, Vágsvegur 60, Vági.

Dagsskrá:

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í farna ári.

2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.

3. Avgerð um rindan av halli sambært góðkenda roknskapinum.

4. Fráboðan frá Suðuroyargrunninum viðvíkjandi rætti grunsins at tilnevna ein nevndarlim sambært § 14.

   Suðuroyargrunnurin hevur boðað frá, at hann fer at tilnevna Malfriður Danberg aftur sum nevndarlim.

5. Val av nevndarlimum.

   Ein nevndarlimur skal veljast.

   Óli Holm stendur fyri vali sambært § 14, stk. 2 og § 21, stk 4 í viðtøkunum. Nevndin mælir til afturval.

6. Val av grannskoðan.

   Nevndin mælir til afturval av verandi uttanhýsis grannskoðara, P/F NOTA, løggilt grannskoðanarvirki.

7. Uppskot frá nevndini:

   A. Uppskot um, at aðalfundurin gevur nevndini soljóðandi heimild at lata felagið ogna sær egin partabrøv:
   *"Aðalfundurin gevur nevndini heimild til - inntil komandi ársaðalfund – at lata felagið – til ognar ella pant – ogna sær egin partabrøv upp til eitt samlað áljóðandi virði svarandi til í alt 1% av partapengi felagsins, smb. § 48 í partafelagslógini. Tá felagið ognar sær egin partabrøv til ognar, má kursurin ikki víkja frá seinasta almannakunngjørda innara virðinum við meira enn 10% ella, um partabrøv felagsins verða skrásett á einum keypsskála, so má kursurin ikki víkja frá galdandi kursinum við meira enn 10%."*

   B. Uppskot um, at: *"Aðalfundurin boðar frá, at aðalfundurin ikki ynskir at taka støðu til, hvørt felagið vil nýta avtøkuskipanina í "lov om finansiel stabilitet"."*
   Sambært ásetingum í "lov om finansiel stabilitet" viðvíkjandi tí nýggju avtøkuskipanini fyri neyðstaddar peningastovnar, skal aðalfundurin í peningastovnum á fyrstkomandi fundi eftir 30. sept. 2010 spyrjast, 1) hvørt aðalfundurin ynskir at boða frá sínari støðu til avtøkuform ella ikki, 2) og um ja, hvørt aðalfundurin í so fall ynskir, at avtøka skal fara fram við nýtslu av avtøkuskipanini ella ikki. Formliga stendur tað aðalfundinum frítt, um hann ynskir at boða frá støðu síni til val av avtøkuformi.

   C. Uppskot um at broyta § 3, stk 1, í viðtøkunum, frá at vera soljóðandi:
   *"Nevndini er heimilað, í tíðarskeiðinum fram til 31. januar 2011, at hækka partapeningin – í einum ella fleiri umførum – við samanlagt kr. 10.000.000,00.*
   *Hækkingin kann fara fram uttan forteknignsrætt fyri partaeigarar felagsins, um so er, at hækkingin fer fram við umlegging av skuld, harundir skifti av ábyrgdarfæi til partabrøv til marknaðarkurs, í hvørjum sambandi ábyrgdarar frítt kunnu rinda møguligan yvirkurs við kontantum gjaldi, ella sum viðurlag fyri yvirtøku felagsins av øðrum fyritøkum, ella ávísum ognarvirðum til eitt virði, ið mótsvarar virðinum á teimum útgivnu partabrøvunum. Undantikið hesum hava partaeigarar felagsins forteknignsrætt til tekning av nýggjum partabrøvum."*
   Til at verða soljóðandi:
   *"Nevndini er heimilað, í tíðarskeiðinum fram til 31. januar 2016, at hækka partapeningin – í einum ella fleiri umførum – við samanlagt kr. 10.000.000,00.*
   *Hækkingin kann fara fram uttan forteknignsrætt fyri partaeigarar felagsins, um so er, at hækkingin fer fram við umlegging av skuld, ella sum viðurlag fyri yvirtøku felagsins av øðrum fyritøkum, ella ávísum ognarvirðum til eitt virði, ið mótsvarar virðinum á teimum útgivnu partabrøvunum. Undantikið hesum hava partaeigarar felagsins forteknignsrætt til tekning av nýggjum partabrøvum."*
   Uppskot um at broyta § 3, stk. 2, í viðtøkunum, frá at vera soljóðandi:
   *"Umframt hækkingina sambært § 3, stk. 1, er nevndini heimilað, í tíðarskeiðinum fram til 31. januar 2011, at hækka partapeningin – í einum ella fleiri umførum – við samanlagt kr. 20.000.000,00. Partaeigarar felagsins skulu hava forteknignsrætt."*
   Til at verða soljóðandi:
   *"Umframt hækkingina sambært § 3, stk. 1, er nevndini heimilað, í tíðarskeiðinum fram til 31. januar 2016, at hækka partapeningin – í einum ella fleiri umførum – við samanlagt kr. 20.000.000,00. Partaeigarar felagsins skulu hava forteknignsrætt."*
   Til at samtykkja uppskotið til viðtøkubroyting krevst smb. § 78, stk. 1 og § 30, stk. 3 í partafelagslógini og § 13, stk. 2 í viðtøkunum, at uppskotið verður samtykt við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og tí á aðalfundinum samlaða umboðaða partapeninginum, eisini partabrøv oman fyri ognaravmarkingina í § 5 í viðtøkunum.

8. Ymiskt

Fyri at hava rætt til at møta á aðalfundinum skulu partaeigarar, fólk við fulltrú og umboð fyri fjølmiðlar í seinasta lagi 5 dagar undan aðalfundinum hava biðið um atgongumerki. Vísandi til, at aðrir viðkomandi dagar undan fráboðaða aðalfundinum ikki eru yrkadagar, skulu partaeigarar, fólk við fulltrú og umboð fyri fjølmiðlar í seinasta lagi týsdagin 26. apríl 2011 kl. 16.00 hava biðið um atgongumerki á deildum felagsins í Vági ella í Tórshavn.

Um so er, at tygum ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, hava tygum møguleika at geva skrivliga fulltrú. Fulltrúarskjal er at finna á www.sparsu.fo og í deildum felagsins.

Grannskoðaða ársfrásøgnin kemur saman við dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum at liggja frammi á høvuðsskrivstovu felagsins í Vági í seinasta lagi 8 dagar fyri aðalfundin.

Vágur, tann 10. apríl 2011

NEVNDIN

SUÐUROYAR SPARIKASSI